Beinta Løwe Jacobsen
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur um verkætlanina Víkingaskip í Hovi, settur Jenisi av Rana, landsstýrismanni við uttanríkis- og mentamálum (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

1. Hvussu nógv er goldið út av stuðlinum til verkætlanina Víkingaskip í Hovi?

2. Hvussu nógvan fíggjarligan stuðul kunnu fyrireikararnir vænta sær til verkætlanina frá tí almenna?

3. Hvat fer landsstýrismaðurin at gera, fyri at verkætlanin kann gerast veruleiki?

Viðmerkingar:
Fyrr í ár var sjøtul settur á verkætlanina Víkingaskip í Hovi. Peningur hevur áður verið settur av á fíggjarlógini til verkætlanina, og eisini hevur Mentamálaráðið í 2017 givið tilsøgn um stuðul á tríggjar milliónir krónur.
Tørvur er á peningi til eina slíka verkætlan, og tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 18. februar 2021

Beinta Løwe Jacobsen